# Orkuframleiðsla og orkunýtsla í Føroyum 2025

Eins og tey mongu undanfarnu árini kemur størsti parturin av føroysku orkunýtsluni frá brennievnum, sum verða innflutt og seld í litrum ella tonsum og frá el orku, ið verður avroknað í kWh. Verður øll orkunýtslan í Føroyum umroknað til GWh, er hon uppgjørd til at vera 4.040 GWh ella góðar 4 milliardir kWh. Hetta er á leið tað sama, sum vit brúktu í 2024.

Vinstrumegin á myndini síggja vit orkukeldurnar, sum eru brenniolja, vatn, vindur, burturkast, biogass og orkan ella hitin, sum hitapumpur taka úr jørðini, luftini ella sjónum.

Føroyska samfelagið er ógvuliga tengt at olju. 88,2% av orkunýtsluni komu frá 306.042 tonsum av olju, sum er á leið tað sama, sum vit brendu undanfarna ár. 2,7 % komu frá burturkasti, sum tær báðar brennistøðirnar brendu. Vatn, vindur, biogass og orka úr umhvørvinum eiga tey seinastu 9,3 %. Grøni parturin er kvinkaður eitt vet uppeftir og táttar nú í 10% , tá vit taka tann varandi partin av brenda ruskinum við.




Høgrumegin á myndini sæst orkunýtslan og av henni standa skipini fyri 43,8 %.

Mest sum øll orkunýtslan til flutning á landi stavar frá olju. Tó er hesin partur minkaður nakað, tí talið á elbilum, sum koyrdu á føroysku vegunum, er í 2025 farið uppum 3.000. Samanborið við onnur lond, hava vit ikki enn fingið nevnivert av tungari ferðslu flutta yvir á el. Talan er bert um 4 bussar. Talið av vanligum motordrivnum akførum liggur um 33.000.

Hús og bygningar í Føroyum eru upphitað við olju, hitapumpum og fjarhita. Fyri 15-20 árum síðani brúktu vit o.u. 50.000 tons av olju til upphiting, men nú er nøgdin komin niður á 33.000 tons sum er ein niðurskurður uppá 34 %. Hetta hóast bæði talið av húskjum og íbúgvum er økt um 20 % í sama tíðarskeiði. Nógv hava lagt um til hitapumpu, og fleiri búeindir, almennir bygningar og vinnubygningar í høvuðsstaðarøkinum hava fingið fjarhita. Fjarhitin kemur frá Brennistøðini, Sundsverkinum, Førka og frá oljufýrdum ketlum, sum brenna spillolju og nakað av gassolju. Nýggju húsini eru betri bjálvað samstundis sum eldri hús eru umbygd og brúka tí minni orku. Sundsverkið hevur latið meira av fjarhita enn undanfarin ár.  Frá elverkinum í Vági hava Pálshøll og Marghøllin fingið 402 MWh til upphiting í 2024.

Í Leirvík fáa Høvdavirkið FMP og spilloljuverkið hitaorku frá Brennistøðini hjá IRF.

Føroysku oljunýtsluna pr. íbúgva er væl størri enn í øðrum framkomnum ídnaðarlondum. Hetta tí at vit hava so nógv fiskiskip og tí at vit í mun til onnur lond, hvørki brúka kol ella gass til upphiting, ídnað ella elframleiðslu. Viðmerkjast skal, at føroyska orkunýtslan roknað í kWh pr. íbúgva eisini er væl størri enn í okkara grannalondum.

Elframleiðslan veksur alsamt og var 506 GWh í 2025 ella 12% av samlaðu orkuni. Økingin í framleiðsluni  á oljuriknu verkunum er heili 42 GWh, meðan framleiðslan úr vatni, vindi og biogassi minkaði við 18 GWh. Grøni parturin er tí  farin úr 53% í 2024 niður í 51% í 2025. Nýtslan veksur, men ongar nýggjar vindmyllur eru settar upp og trupulleikar hava rakt lundina í Húsahaga. Vit kunnu tó ugga okkum við, at uppsetanin av battaríum og synkronkompensatorinum, hava gjørt tað lættari at dúva meira uppá vindorkuna.

Hitapumpur brúktu 40 GWh av el-orku, tóku 96 GWh úr umhvørvinum og lótu 126 GWh til upphiting.